## Maðurin fjalir seg

Liiljana Karadzic-Zelen, sum er gift við bosniaserbiska generalinum Radovan Karadzic, heldur uppá, at hon hevur ikki sæð mann sín tey seinastu fýra árini.

Við blaðið Evropa sigur hon, at hon hevur ikki borið eyga við mannin síðani 2001, og at hon veit ikki, hvar hann er. Hon leggur afturat, at tey bæði børnini, ein sonur og ein dóttur, hava ikki sæð pápan síðani 1998. Sjálv var hon saman við honum hálvan annan tíma í 2001, sigur hon.

ST-krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia hevur ákært Radovan Karadzic fyri krígsbrotsverk í borgarakrígnum í Bosnia, sum vardi frá 1992 til 1995. Ákæran bleiv sett fram longu fyri tíggju árum síðani, men enn er generalurin ikki funnin. Hann er millum annað ákærdur fyri at hava havt høvuðsábyrgdina, tá næstan 8.000 menn og dreingir vórðu myrdir í bosniska býnum Srebrenica á sumri í 1995.

## Fjord Line heldur tørn

Teir báðar seinastu mánaðarnar hava reiðaríini Fjord Line og Color Line kappast um ferðafólkini á rutuni ímillum Vesturnoreg og Hanstholm. Kappingin byrjaði, tá Color Line setti eina ferju inn í siglingina, sum Fjord Line higartil hevur havt.

Leiðslan í Fjord Line sigur við Bergens Tidende, at reiðaríið flutti 5,8 prosent færri ferðafólk til Danmarkar í mai mánað samanborið við sama mánað í fjør, men at at í juni var ferðafólkatalið hálvt annað prosent størri enn í juni í fjør. Hohne Haugsdal á kunningardeildini sigur við Bergens Tidende, at umleið 1.000 ferðafólk eru við hvønn túrin, og tað eru tey nøgd við. Ferjan hjá Fjord Line tekur 1.600 ferðafólk.

Kunningarstjórin hjá Fjord Line, Atle Kvamme, sigur við Bergens Tidende, at tann veruliga kappingin um ferðafólkini byrjar ikki fyrr enn eftir summarsiglingina. Hann sigur, at reiðaríið fer at gera alt fyri at varðveita síni ferðafólk, tí meiri enn 60 prosent av teimum, sum sigla við Fjord Line, ferðast við ferjuni til og úr Danmark. Tí hevur danmarkarrutan sera stóran týdning fyri reiðaríið, sigur hann.

## Sjáldsom gongustjørna

Ein stjørnufrøðingur hjá amerikonsku rúmdarumsitingini NASA hevur funnið eina higartil ókenda gongustjørnu 149 ljósár ella meiri enn 14.000 milliardir kilometrar úti í rúmdini.

Tað sjáldsama við gongustjørnuni, sum hevur fingið navnið HD 188753 Ab, er, at hon hevur ikki eina, men tríggjar sólir. NASA sigur, at eins og Jupiter er gongustjørnan av gassi, men at hon átti als ikki at verið til, tí tyngdarmegin frá teimum trimum sólunum togar í hana og sleingir hana út í ta tómu rúmdina. Men kortini er hon har, og tí noyðast serfrøðingarnir at endurskoða sínar vanligu uppfatanir, skrivar AP.

Fyri tíggju árum síðani kendu serfrøðingarnir bara gongustjørnur í okkara egnu sólskipan,, men nýggj tøkni hevur gjørt, at tey seinastu árini hava teir funnið 140 stjørnur umframt fleiri gongustjørnur. Men HD 188753 er tann einasta, sum hevur tríggjar sólir.

## Giftist skeivum manni

Hendan søgan er eitt gott dømi um, at tað ræður um at hava oyruni opin, tá ein skal giftast.

Indiska brúðurin svaraði játtandi, tá hon bleiv spurd, um hon vildi giftast við brúðgóminum Merhaj. Men har var ein trupulleiki. Bróðgómurin æt ikki Merhaj, men Siraj. Av misgáum hevði maðurin, sum skuldi víga tey, mistikið seg, soleiðis at hann nú hevði gift ta ungu kvinnuna við bróðurinum hjá tí rætta brúðgóminum. Tí stóð í vígslubrævinum, at hon var gift við Merhaj og ikki Siraj.

Blaðið Press Trust of India skrivar, at brúðurin bleiv send heim aftur til foreldrini dagin eftir. Nú skulu tey eldru í báðum ættunum so gera av, hvørjum av brøðrunum tann unga kvinnan er gift við.



*Týsdagin mótmæltu kvinnur í Bagdad, at tann nýggja grundlógin tekur rættindi frá teimum.*

*Mynd: Reuters*

# Kvinnurnar í Irak missa fleiri rættindi

**Uppskotið til nýggja irakska grundlóg gevur kvinnunum færri rættindi, enn tær høvdu, tá Saddam Hussein ráddi.**

IRAK

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Tær illa lýddu sharia-lógirnar fáa stóra ávirkan á ta komandi irakska grundlógina, og tað rakar serliga kvinnurnar.

Uppskotið er ikki liðugt enn, men sambært einum skjali, sum New York Times hevur fingið fatur á, fáa tær iraksku kvinnurnar færri rættindi, enn tær høvdu, tá Saddam hussein sat við valdið. Innihaldið í skjalinum er eisini likið út í Irak, og fyrr í vikuni gingu kvinnur mótmæølisgongu í Bagdad.

Sambært skjalinum stendur í grundlógaruppskotinum, at í framtíðini kunnu irakskar kvinnur ikki giftast ella skiljast, uttan at skyldfólk teirra góðkenna tað. Haraftur-ímóti nýtist monnunum ikki slíka góðkenning, um teir ætla at gifta seg, og teimum nýtist heldur ikki at spyrja skyldfólkini, ætla teir sær at fara frá konuni. Tað er nóg mikið, at teir siga tað við hana tríggjar ferðir, stendur í uppskotinum.

New York Times vísir á, at hetta er eitt stórt afturstig fyri kvinnurnar, tí tá stýrið hjá Saddam Hussein sat við valdið í Bagdad, høvdu tær iraksku kvinnurnar størri rættindi enn kvinnur aðrastaðni í tí arabiska heiminum. Nú skulu tær aftur laga seg eftir sharia-lógunum eins og kvinnurnar í hinum londunum.

Í løtuni virkar Irak eftir einari fyribilsgrundlóg, sum amerikanararnir høvdu eina ávísa ávirkan á, og sum tryggjar kvinnum og monnum somu rættindi. At kvinnurnar nú aftur missa síni rættindi verður roknað sum ein sigur fyri teir átrúnaðarligu og politisku leiðararnar hjá shiamuslimunum. Teir hava alla tíðina sagt, at Islam eigur at vera meginreglan í teirri nýggju grundlógini.

Tjóðartingið í Bagdad skal hava tað endaliga grundlógaruppskotið tann 15. august, men fyribils er einki, sum bendir á, at kvinnurnar kunnu vænta sær nakrar ábøtur til ta tíð, skrivar New York Times.

# Bush fór í bumbuskýlið

**Fyri trimum mánaðum síðani bleiv George W. Bush, forseti, fluttur í skundi í eitt bumbuskýli, tí onkur væntaði álop á Hvítu Húsini.**

USA

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*



*Eitt flogfar kom ov nær Hvítu Húsunum, og so mátti Bush í bumbuskýlið.*

Síðani atsóknirnar tann 11. september í 2001 hevur amerikanska flogvápnið havt sera neyvt eftirlit við øllum flogførum, sum koma í amerikanskt loftrúm, men kortini hava ikki færri enn 3.400 flogfør og tyrlur brotið trygdarreglurnar.

Í loftrúminum yvir høvuðsstaðnum Washington eru serligar reglur galdandi. Eitt nú hava hvørki flogfør ella tyrlur loyvi at koma inn yvir eitt øki, sum er 5.000 ferkilometrar stórt, men tað hevur víst seg at vera trupult at fáa flog- og tyrluskipararnar at halda hesa regluna, skrivar AP.

Fyri tveimum mánaðum síðani kom eitt lítlið Cessna-flogfar inn um trygdarmarkið, og tað gjørdi, at løgreglan flutti alt fólkið úr Hvítu Húsunum og Kongressini alt fyri eitt. Ein mánað frammanundan hendi tað sama, og tá bleiv George W. Bush, forseti, fluttur niður í bumbuskýlið undir Hvítu Húsunum. Í síðsta mánað fóru ávaringartólini eisini í gongd, tí tá var eitt flogfar komið ov nær frítíðarstaðnum hjá forsetanum, Camp David.

Ein hoyring í Umboðsmannatinginum fyrradagin avdúkaði, at trygdarskipanin virkar ikki nóg væl, tí samstarvið ímillum tær ymsu trygdartænasturnar er ikki nóg gott. Eitt nú kom fram, at tænasturnar ávara ikki hvør aðra, og at tær eru alt ov seinar at kunna hvør aðra, tá okkurt er á vási.